# Karsten Hansen má rokna einaferð afturat um Smyril

**Spurningurin um nýggja Smyril er nú sendur út aftur í Fíggjarmálastýrið, sum skal gera ymsar útrokningar av nýggjum. Bjarni Djurholm sigur, at málið er búgvið at taka støðu til**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

Málið um, hvussu nýggja suðuroyarskipið skal síggja út, er enn einaferð útsett.

Týsdagin hevði Landsstýrið málið til viðgerðar fyri fjórðu ferð, men heldur ikki hesiferð eydnaðist tað at koma til eina niðurstøðu.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sigur, at málið var til viðgerðar bæði væl og leingi á fundinum týsdagin. Men kortini var niðurstøðan, at Landsstýrið vil hava fleiri upplýsingar í málinum , áðrenn endalig støða verður tikin.

Tað, sum Landsstýrið hugsar um, er at fáa fleiri útrokningar um fíggjarligu viðurskiftini í sambandi við bygingina.

Bjarni Djurholm sigur, at á langtíðarfíggjarætlanini eru 240 milliónir settar av til nýtt suðuroyarskip.

– Tað, sum Landsstýrið nú vil hava at vita frá Fíggjarmálastýrinum, er, hvussu tað skal handfarast tekniskt, eitt nú í sambandi við fíggjaræatlanina , um meiri peningur skal brúkast til ætlanina.

– Annars er allar fíggjarligar metingar longu gjørdar, so málið er búgvið at taka støðu til. Men niðurstøðan er so, at Landsstýrið vil hava fleiri fíggjarligar útrokningar og lýsingar av málinum, og tað fari eg ikki at seta meg ímóti , sigur Bjarni Djurholm.

Sjálvur heldur hann tískil ikki, at tað er nøkur orsøk til at senda málið útaftur í Fíggjarmálastýrið , tí allar útrokningarnar eru gjørdar.

– Tað mest einfalda hevði stutt og greitt verið at lagt eitt uppskot fyri tingið um at byggja eitt ávíst skip, sigur hann.

Annars heldur hann, at landsstýrið eigur at avgreiða málið nú.

– Tað er ikki Vinnumálastýrið sum ger, at málið dregur út, tí nú eru tað skjótt tveir mánaðir síðani, at vit avgreiddu málið til Landsstýrið at taka støðu til.

### Sigur onki enn

Enn vil Bjarni Djurholm ikki siga nakað um, hvat skip, hann hevur mælt landsstýrinum til at byggja.

Hann sigur tó so mikið, at ávísir upplýsingar í greinini í Sosialinum leygardagin, vóru ikki eftirfarandi.

Men hann vil heldur ikki siga, hvørjir upplýsingar vóru misvísandi.

Tað, sum fleiri keldur hava upplýst, er,annars, at Bjarni Djurholm hevur mælt Landsstýrinum til at byggja eitt skip, sum siglur 19 míl.

Hetta er ikki tað skipið, sum nevndin, ið hevur fyrireikað byggingina, hevur mælt til, tí hon mælir til eitt skip, sum siglur 21 míl. Í hesi nevndini hava sitið leiðslan á Strandferðsluni, umboð fyri manningina á Smyrli, umframt umboð fyri tey, sum skulu brúka skipið, nevniliga umboð fyri kommunurnar í Suðuroynni og vinnulívið í Suðuroynni.

Hendan nevndin hevur síðani samstarvað við viðgitna danska projekteringsfelagið, Knud E. Hansen og sípani eru tey komin fram til hetta ávísa skipið, sum siglur 21 míl.

Fyrr í vikuni sendu borgarstjórarnir í Suðuroynni og vinnulívsfólk greið boð norður í Landsstýrið um, at einasta loysn, sum verður góðtikin, er tað skipið, sum tann sakkøna bygginevndin hevur mælt til.

Bjarni Djurholm hevur ikki stórvegis viðmerkingar til tað. Men hann sigur, at hann kennir sjónarmiðini og hevur lagt sær tey í geyma.



*Smyril sleppur atr sigla til 2005, men enn er ikki semja um, hvussu nýggja suðuroyarskipið skal síggja út*

Langur leygardagur

Leygardagin 24. mars er opið til kl. 17.00

frátikin vøra verður seld við avsláttri

7 ltr. máling 299,-
Voksdúkar frá 15,- /mtr.
Allir aðrir voksdúkar -10%

10,- 30,- 50,- Marknaður

Støkk inn á gólvið og geri kvettið

Stanley
Tlf. 42 22 70
Norðskála

# Vilja nú hava svar um loysing til Suðuroynna

**Suðuroyingar, sum herfyri settu løgmanni og varaløgmanni nakrar spurningar um loysing til suðuroynna, hava ikki enn fingið svar. Tað vilja teir nú hava**

LOYSING
*Áki Bertholdsen*

Fyri stuttum sendu nakrir suðuroyingar bæði Anfinni Kallsberg, Løgmanni, og Høgna Hoydal, Varaløgmanni, ein forvitnisligan fyrispurning.

Teir vildu hava at vita frá hesum báðum fremstu politikarum okkara, um ein fólkaatkvøðu í Suðuroynni hevði verðið vird, um ein meiriluti atkvøddi fyri, at Suðuroyggin skuldi taka loysing frá restini av Føroyum.

Enn hava suðuroyngarnir ikki fingið svar.

Men svar vilja teir hava og tí spyrja teir nú einaferð afturat.

Teir vísa á, at í Sosialinum hevur varaløgmaður lovað at svara, men kortini hendi onki.

– Og tá ið vit nú hoyra í fjølmiðlunum, at Føroya Landsstýrið heldur ikki er sinnað at útvega suðuroyingum tað skip, sum ein samdur arbeiðsbólkur var samdur um, var tað rætta til endamálið, so er tað í dag enn meiri neyðugt enn nakrantíð at fáa spurningin svaraðan, siga suðuroyingarnir.

Teir siga at enda, at tá ið teir settu fyrispurningin alment fram í bløðunum, vilja reir eisini, at svarað verður í bløðunum

Tey, sum hava skrivað undir hesa nýggju áheitanina á Løgmann og Varaløgmann, eru seks lærarar á Tvøroyri, teir eru: Alvi Mortensen, Finn Thomsen, Súsanna Bertholdsen, Jónsvein Hovgaard, Sofus Strøm og Jens Johannesen.



*Nógvir føroyingar stuðlaðu londunum eystanfyri í kalda krígnum. Tí undrast Heðin Mortensen úr Sambandsflokkinum á, at eingi stig vera tikin til at kanna leiklutin hjá føroyingum í kollveltingarætlanunum hjá millum annað Warszawa-samgonguni*



# Heðin krevur svar um skjøl eystanfyri

**Peningur er játtaður til víðari kanningar leiklutinum hjá Danmark og USA í hernaðarmálinum í Føroyum undir kalda krígnum. Heðin Mortensen úr Sambandsflokkinum undrast á, hví eingin orka verður løgd í at kanna sambandið millum Føroyar og kommunistisku londini eystanfyri**

SKJALAGRANSKAN
*John Johannessen*

Landsstýrismaðurin í mentamálum skal í næstum greiða tinginum frá, hví hann hevur játtað fleiri pengar til at kanna vesturlendsk skjøl frá kalda krígnum, samstundis sum einki verður gjørt við skjølini eystanfyri.

Tað er Heðin Mortensen úr Sambandsflokkinum, sum hevur sett Tórbjørn Jacobsen fyrispurningin, eftir at tað er komið fram í bløðunum, at landsstýrismaðurin í mentamálum, Tórbjørn Jacobsen, hevur latið pening burtur av játtan síni til at kanna skjølini.

– Eg kundi hugsað mær, at landsstýrismaðurin greiðir tinginum frá, hvørjar ætlanir eru á økinum, og av hvørji játtan peningurin er komin frá, sigur Heðin Mortensen í fyrispurninginum.

### Gera einki eystanfyri

Heðin Mortensen staðfestir, at tann orkan, sum løgd er í at finna skjøl í skjalagoymslunum vestanfyri, er ikki til staðar, tá ræður um goymslurnar eystanfyri.

Hetta heldur Heðin Mortensen vera at undrast á, tí lítil ivi er um, at goymslurnar eystanfyri eru nógv verri skipaðar og í vánaligari standi enn vetsanfyri.

– Vit mugu ikki gloyma, at til fyri tíggju árum síðani var Warszawa-samgongan til reiðar at leypa á vesturheimin til tess at fremja kollvelting við valdi. Her vestanfyri vóru ikki so fá, sum trúðu upp á harðskap, kollvelting og einaræði fæloysinganna. Tað vóru ikki so fá, sum áttu partisanturriklæði, Maosa Lítlu Reyðu og høvdu blóðdálkaðar antidemokratar, sum Lenin og Che Guevara á vegginum, vísir Heðin Mortensen á.

Heðin Mortensen staðfestir, at í Bretlandi, í Danmark og øðrum av okkara sameindu londum eru fleiri fólk avdúkað eftir kanningar í eysturevropeiskum skjalasøvnum. Og eisini eru álopsætlanir, avlurtingar og ráðagerðir komnar fram í ljósmála.

Samstundis staðfestir Heðin Mortensen, at landsstýrismaðurin í mentamálum, sum hevur so stóran áhuga fyri skjalasøvnum, bókasøvnum og gransking, tó ikki er áhugaður í at gera neyðugu grundgranskingina eystanfyri.

### Tveita runubløk

Heðin Mortensen vísir á, at vit longu hava eina frágreiðing frá kalda krígnum, sum vísir okkum, at vestanveldini djarvt og trúliga vildu verja lítla land okkara. Í hesum sambandi sipar Heðin Mortensen til Svørtubók.

– Vit kunnu helst semjast um, at løgmenn okkara kundu gjørt meira við at kunna og sannføra fólk um verjutiltøk, men eingin kann ivast í, at teir gjørdu tað, sum rættast var innan fyri teir møguleikar, teir høvdu, sigur Heðin Mortensen.

Men hann heldur, at orsøkin til víðari kanningarnar vestanfyri er, at nú skal trampast meir í hesum, serliga í teimum gløggu eygleiðingum, sum amerikanarar og danir gjørdu viðvíkjandi verjufatanini hjá loysingarsinnaður og vinstravendum í Føroyum.

– Runubløk skulu kleiggjast saman at tveita eftir okkara stóru monnum, serliga Peturi Mohr Dam og Christiani Djurhuus. Men hvørjar ráðagerðir og hvørjir samstarvshugaðir vinstravendir vóru, tað skal fúna, gulna og hvørva á stongdum KGB-stovnum, staðfestir Heðin Mortensen.

# Siga ja til Schengen

**Ein meiriluti í uttanlandsnevndini er vorðin samdur um at mæla løgtinginum til at atkvøða fyri at seta Schengen-avtaluna í gildi fyri Føroyar**

SCHENGEN
*John Johannessen*

Eftir drúgva viðgerð í uttanlandsnevndini er bara Miðflokkurin ímóti at mæla tinginum til at seta í gildi fyri Føroyar Schengen-avtaluna.

Viðgerðin í uttanlandsnevndini av Schengen-avtaluni hevur verið drúgv og trupul. Nógvir stórir ivaspurningar hava verið at sett seg inn í, men loksins er meirilutin í nevndini vorðin samdur um, at tað er frægast at fara upp í samstarvið, fyri ikki at seta seg uttan fyri tað, sum onnur lond hava tikið seg saman um.

Schengen avtalan var til aðru viðgerðar í tinginum í gjár. Men tá Sosialurin fór til prentingar bar ikki til at siga, hvussu fór at verða við atkvøðugreiðsluni.

# Seta flokstingfríggjakvøldið

**Árliga flokstingTjóðveldisfloksins verður sett á Toftum fríggjakvøldið**

FLOKSTING
*John Johannessen*

Tjóðveldisflokkurin fer um vikuskiftið at halda floksting í B68-húsinum á Svangaskarði á Toftum.

Lagt verður fyri fríggjakvøldið við formansfrágreiðingini hjá Høgna Hoydal, formanni floksins, og síðani verður orðaskifti um formansfrágreiðingina og um fullveldismálið.

Leygardagin verður orðaskifti um ymisk politisk mál hjá Tjóðveldisflokkinum og um aktuell politisk mál.

Eisini verður orðaskifti um at dagføra stevnumið floksin, sum eru frá 1948. Í dagførdu stevnumiðunum skulu vera boð uppá aktuellar samfelagsspurningar.

Flokstingið hjá Tjóðveldisflokkinum verður opið fyri fjølmiðlunum. Hetta er fyrstu ferð, at fjølmiðlarnir sleppa við á floksting hjá Tjóðveldisflokkinum.

# Miðflokkurin landsfund í apríl

LANDSFUNDUR
*John Johannessen*

Landsfundurin hjá Miðflokkinum verður á Hotel Tórshavn í Havn leygardagin 7. apríl.

Á fundinum fer Regin Jacobsen, stjóri, at viðgera politisku karmarnar um vinnulívið og serliga alivinnuna. Eitt umboð frá Føroya Pro Vitae fer at greiða frá virksemi felagsins, og Jenis av Rana, tingmaður Miðfloksins, fer at greiða frá politisku støðuni.

# Sambandsflokkurin skal velja formann

**Tvey valevni eru til formanssessin og tvey til næstformanssessin í Sambandsflokkinum, sum heldur landsfund á Læraraskúlanum um vikuskiftið**

LANDSFUNDUR
*John Johannessen*

Landsfundur Sambandsfloksins byrjar við kampvali.

Formans- og næstformansval er nevniliga fyrst á skránni fyri landsfundin, sum verður hildin á Læraraskúlanum í Havn um vikuskiftið. Og tvey valevni eru til báðar sessirnar.

Lisbeth L. Petersen stillar upp ímóti Edmundi Joensen til formanssessin, og Heðin Mortensen og Alfred Olsen hava gjørt av at dystast um næstformanssessin, nú Trygvi Guttesen leggur frá sær.

Leygarmorgunin klokkan tíggju verður farið undir politikst orðaskifti, og klokkan 15 skal Lars Løkke Rasmussen, næstformaður í danska Vinstraflokkinum, halda røðu.